# Nøkur brøv frá Beethoven

**HUGLEIÐING**
*Heri Mohr*



Tað verður hildið, at Ludwig van Beethoven er føddur tann 16. desember 1770 í Bonn. Á dópsváttanina, dagfest 17. desember 1770, hevur hann sjálvur skrivað: "Dópsattestin tykist ikki at vera bein, av tí at tað var ein annar Ludwig undan mær." Síðani hevur hann skoytt upp í: 1772. Hetta árstalið er eisini á ymiskum skjølum, pápin hevur skrivað, og keldur vilja vera við, at pápin, tenorsangari og musikari, vildi gera hendan evnaliga sonin av sjey børnum so ungan sum gjørligt sum "undurbarn." Tá í tíðini vórðu børn vanliga fødd og doypt dag um dag.

"Kanska" ella "ætlandi" eru orð, sum tíðum mugu brúkast um barnaárini hjá Beethoven, tí so nógv ivasamt og umstrítt verður sagt um tað tíðarskeiðið; og ikki minst um pápan, Johann: Var hann eitt fitt og dámligt menniskja við hepnari hond sum musikklærari? Ella var hann kanska eitt skrímsl, sum vildi tjena pening upp á tann gávuríka sonin, og hann tessvegna dróg drongin úr songini um náttina til venjingar. Hann, pápin, kundi tíðum vera fullur, kravmikil og strangur – hann vildi jú gera sonin til undurbarn – og um hann hevur verið so órímiligur, at hann beinleiðis hevur stongt Ludwig inni í kjallaranum, vita vit ikki við vissu.

1779, tá hevur Ludwig verið 9 ára gamal, gjørdist eitt týðandi ár hjá honum, tí tá dugdi pápin at síggja, at neyðugt var at útvega soninum musikkundirvísing á hægsta stigi. Tessvegna komu aðrir, kendir lærarar at undirvísa hesum evnaríka drongi, og 11 ára gamal gjørdist hann næmingur hjá tí virda Christian Gottlob Neefe, sum um somu tí gjørdist hofforganistur. Árið eftir varð Beethoven assistentur og vikarur hjá hofforganistinum. Tann 2. mars 1783 skrivaði Neefe í einari grein, at um Beethoven helt fram, sum hann var byrjaður, fór hann at gerast ein annar Mozart.

Fólk fóru nú at leggja merki til Beethoven. 1783 gjørdist hann cembalistur í einum orkestri, og sama árið gav hann út 3 klaversonatur.

Beethoven fekk styrk til námsdvøl í Wien, og 1787 – 16 ára gamal – fór hann til Mozart har at fáa vegleiðing í tónleiki. Hann fekk høvi at improvisera eitt ávíst tema við fugu eftir Mozart. Mozart – tá 31 ára gamal – gjørdist púra bilsin og segði bergtikin við tey, ið hoyrdu hesa drúgvu improvisering: "Leggið merki til hendan mannin, hann verður av sonnum navnframur." Um sama mundi doyði mamma Ludwig av tuberklum, og tessvegna noyddist hann at slíta námsferðina og fara heim aftur til Bonn. Tað var eitt lemjandi slag fyri Beethoven at missa mammuna, sum hann mintist við stórum kærleika og sum sín besta vin. Tá vísti hann sína óvanligu karakterstyrkju. Hann átók sær leiklutin sum álitið í familjuni. Frá pápanum bað hann um at fáa hansara hálvu løn, til tess at hann (Ludwig) kundi forsyrgja sínum smærri systkjum.

1792 fór Beethoven aftur tll Wien, og har varð hann verandi restina av sínum lívi. Har kom hann tá í læru hjá Haydn ( Mozart doyði 1791), men tað gekk ikki altíð so væl, Beethoven vildi ganga sínar egnu leiðir; fylgdi ikki altíð teimum teoretisku reglunum. Hann segði: "Eg vil læra tað, sum samsvarar við reglurnar fyri at finna tann besta mátan at bróta tær upp á."

So við og við stóðu honum dyrnar opnar hjá yvirstættini í tónlistini í Wien. Hansara persónligheit gav honum virðing, og hann var væl sæddur, hóast hansara trupla sinnalag og bersøgni. Hann lærdi seg at dansa, átti ríðingarhest, hevði arbeiðskonu og køkshjálp. Varð ofta og tíðum forelskaður, men tað vardi ikki so leingi hvørja ferð. Sum oftast vóru tað damur av tí betra slagnum, ið hann fall fyri – ella tær fyri honum!

Tá Beethoven doyði í 1827, vórðu trý brøv, hann hevði skrivað við blýanti, funnin í einari loyndari skuffu í hansara skrivaraborði. Tey vóru dagfest, men við ongum árstali. Ymiskt er gitt um, nær brøvini kunnu vera skrivaði. Vinmaðurin Anton Schindler, sum skrivaði eina Beethoven-biografi, vildi vera við, at brøvini vóru frá 1801, og at tey vóru ætlað Theresu von Brunswick, hansara ódoyggiligu (die unsterbliche Geliebte), sum hann í eini tvey ár skal hava verið trúlovaður við í duldum. Brot úr hesum brøvum:

6. juli á morgni:
"Til ta ódoyggiligu elskaðu. Mín eingil! Mítt alt! Mítt eg! Bert nøkur fá orð í dag og tað við blýanti (við tínum). Heldur ikki í dag fái eg skrivað tær alt tað mínum lívi viðvíkjandi, sum eg í hesum døgum havi umhugsað (…), Uff, tað eru løtur, hvar eg haldi, at orð einki siga (…)"

6. juli á kvøldi:
"(…) Eg gráti, tá eg hugsi, at tú einki frættir frá mær fyrr enn komandi leygardag (…) Hvussu nógv tú so enn elskar meg – eg elski teg upp aftur meira. Ver ongantíð bangin fyri at siga mær tað (…)"

Í sínari dagbók skrivar Beethoven: "Tú eigur at vera eitt menniskja, sum ikki livir fyri teg sjálvan, men einans fyri onnur! Fyri tær gevst ikki onnur lukka enn hon, sum kann veitast tær av sannari list. Áh, Gud! Veit mær megi til at vinna yvir mær sjálvum! Einki í lívinum eigur at binda meg."

Beethoven var alt sítt lív ein einsamallur maður. Upp á spurningin, hví hann ongantíð hevði gift seg, svaraði hann skemtingarsamt: "Hjá konufólkunum hava sálirnar einki likam og likamini onga sál."



*Ludvig van Beethoven*



*Therese von Brunswick*

"Góðan morgun, tann 7. juli:
Meðan eg enn liggi her í mínari song, streyma tankarnir inn yvir meg, mín ódoyggiliga elskaða – so glaðir, so syrgnir bíða teir eftir lagnuni, hvørt hon vil bønhoyra okkum.

Liva kann eg bara einans heilt við tær ella als ikki. Ja, eg havi avgjørt at fjakka í verðini, til eg kann tveita meg í tínar armar, og heilt kenna meg heima har hjá tær – og lata mína sál, elt av tær, stíga upp móti andanna ríki…. Ongantíð kann ein annar eiga mítt hjarta – ongantíð, ongantíð! Áh, Gud, hví skal man vera burturstadddur frá henni, man elskar?...Ver rólig – elska meg – í dag – í gjár – Eg gráti, soleiðis leingist mær eftir tær – tær – tær! Mítt lív – mítt alt – Liv væl! Áh, elska meg altíð, undirmet ongantíð tín elskaða Ludwigs trúfasta hjarta. Ævigur tín – æviga mín – ævig vit bæði."

Hóast Beethoven fyri tað mesta var í aristokratiskum umhvørvi, hevði hann onga virðing fyri tí, ið hevði rákan av etikettu; hetta kom t.d. til sjóndar í einari frásøgn frá 1812, tá hann og Goethe hittust í Karlsbad:

"Kongar og fúrstar kunnu nokk gera professorar og geheimiráð (gamal tittul/hm) og hanga titlar og heiðursmerki á teirra bringu, men stór menniskju kunnu teir ikki gera – ikki ond, sum hevjar seg upp yvir mongdina. Tá ið menn sum Goethe og eg koma saman, skulu hasir harrar (kongar og fúrstar/hm) merkja, hvat fólk sum vit halda vera stórt. Á heimvegnum møttu vit báðir allari teirri keisarligu familjuni. Goethe slapp mínum armi fyri at stilla seg við vegjaðaran og tók hattin av høvdinum ( …..) Aftaná gav eg honum eina ordans yvirháling og vísti á hansara syndir. Eg gav onga pardon."

Beethoven merkti lagnunar kvørkratak, sum so líðandi gjørdi hann deyvan. Hetta hevði ómetaligan ávirkan á hansara sinn og sál. Hann gjørdist tónlistanna gigantur proportionalt við hoyrnini, sum hvarv. Nøkur av hansara mætastu verkum, eitt nú ódoyggiliga 9. symfoni, hoyrdi hann als ikki, meðan hann stóð á pallinum saman við dirigentinum, tá symfoniin varð spæld á fyrsta sinni í 1824. Og sama árið varð velduga og kravmikla messan Missa solemnis, sum hann hevði arbeitt við í 5 ár, eisini framførd á fyrsta sinni. Hana hoyrdi hann heldur ikki.

Í longri tíð duldi hann fyri fólki, at hoyrnin var farin at bila. Hann helt, hetta at gerast deyvur, var stór skomm.

Í 1801 skrivaði Beethoven soljóðandi til vin sín Franz Wegeler:

"Hesin óndsinnaði illi andin, mín vánaliga hoyrna, hevur lagt ein tungan stein á mínum vegi. Í eini trý ár eri eg farin at hoyra alt verri og verri….Eg livi lívið á ein neyðarsligan hátt. Í næstan 2 ár havi eg hildið meg burtur frá øllum vertskapi, tí fyri meg er tað ógjørligt at siga við fólk: Eg eri deyvur! Hevði eg so havt eitt annað starv, so kundi tað av neyð gingið, men í mínari lívsgrein er hetta ein ræðulig støða. Og so mínir fíggindar, sum ikki eru fáir, hvat vildu teir ikki sagt. Ofta havi eg forbannað mínum skapara og mínari tilveru. Plutarch hevur lært meg resignatión. Eg skal eftir førimuni standa ímóti mínari lagnu, hóast tað eru løtur í mínum lívi, hvar eg kenni meg sum Guds ólukkuligasta skapning av øllum. Eg biði teg ikki siga nøkrum frá mínari støðu…"

Og so tann 6.oktober 1802 skrivar Beethoven eitt hjartanemandi bræv til sínar brøður Karl og Johann. Um tað mundið helt Beethoven til í bygdini Heiligenstadt nærhendis Wien. Tessvegna er brævið kent undir heitinum

## Heiligenstadt testamentið

"Áh, tit menniskju, sum halda meg vera hatskan, stívrendan og mannaillviljaðan, hvønn órætt gera tit mær ikki! Tit kenna ikki tað dulda, sum kann vera orsøkin til tykkara hugsan. Heilt frá barnaárum hevur mítt hjarta og sinn verið tongt at góðsku og vælvild. Eg havi altíð verið bitin av at gera okkurt stórt; men sum tit vita, so havi eg í eini seks ár verið raktur av einum ólekiligum breki, sum ódugnaligir læknar hava gjørt verri. Ár eftir ár snýttur í mínari